## Pól Johannus heldur fram á Toftum

Pól Jóhannus Justinssen verður eisini komandi ár, at síggja í reyða B68 búnanum. Tað skrivar heimasíðan hjá B68. - Nú hava 14 leikarar sáttmála við B68 fyri 2010, og tað er nevndin hjá B68 sjálvandi sera fegin um, verður sagt á heimasíðuni hjá B68. Pól Jóhannus Justinussen kom til B68 eftir summarsteðgin í fjør og hevur verið fastur maður í miðverjuni hjá B68 síðani. Pól Jóhannus, sum hevði sín fótbóltsliga uppvøkstur í NSÍ, spælir eisini á U21 landsliðnum.



## Nýggir KÍ-sangir

Todi Jónsson og Atli Danielsen gjørdu comeback fyri KÍ á vøllinum sunnudagin, og kring vøllin ljómaðu spildurnýggir KÍ-sangir. Í løtuni verða upptøkur gjørdar til nýggja tónleikaútgávu hjá KÍ, og í sambandi við dystin ímóti B68 sunnudagin klokkan 15, vóru tríggir av sangunum spældir fyrstu ferð. Lokali rockbólkurin Grandma's Basement eigur eina sangin, rockhetjan Karl Martin Samuelsen syngur ein, og síðani hevur fjepparin Eyðun Thorgeirsson gjørt ein sang, sum tveir av tónleikunum í bólkinum Credo hava spælt inn.

KÍ-B68 2-4 (1-2):

# Todi møtti yvirvaldinum



Fyri fyrstu ferð síðan 1992 var Todi Jónsson á blettinum fyri barndómsfelagið í gjár. Men tað hjálpti lítið móti flúgvandi toftamonnunum

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍ

B68

**Todi Jónsson og Páll Klettskarð skoraðu báðir. Men tað hjálpti øgiliga lítið ímóti einum flúgvandi B68-liðið við einum ávísum Øssuri Hansen, sum David Beckham kundi øvunda í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Eg vóni ikki, at fólk verða alt ov skuffað og kedd. Vit fara at gera tað betur.

Orðini eigur Páll Klettskarð, sum hóast hann gjørdi eitt mál í stuttu tíðini, hann var inni, var týðiliga vónbrotin eftir dystin.

Men tað er skilligt, at hann stóð við hasi kensluni í gjár. Todi, Atli og Páll spældu á fyrsta sinni í longri tíð við KÍ, og hetta var nógv gjørt burturúr frammanundan. Vónirnar vóru veruliga høgar í Klaksvík til dystin ímóti B68.

Kanska gerast orðini hjá einum av smápiltunum á liðnum fyri tíð síðan bara sannari og sannari.

- Bara Ronaldo kann bjarga KÍ.

Men helst er tað soleiðis, at KÍ bara møtti best spælandi liðnum í Føroyum í gjár, og tá 38 ára gamli Øssur Hansen fekk nærum hvønn bólt perfektan, so var lítið at gera.

### Todi gjørdi sítt

Tá dysturin var næstan líka gamal í minuttum, sum Todi Jónsson er í árum, fekk KÍ eitt hornaspark. Bólturin varð lagdur væl innfyri. Kristoffur Jakobsen snittaði bóltin við høvdinum og úr einum og einum hálvum metri eydnaðist 37 ára gamla áloyparanum at skora sítt fyrsta mál fyri KÍ síðan 1992.

Men áðrenn tað hevði ein annar veteranur longu verið upp á spæl, tá Øssur Hansen eina løtu frammanundan hevði lagt eitt perfekt fríspark til Keita, sum stýrdi bóltin aftur um Jákup Mikkelsen.

Í fyrra hálvleiki, sást tó væl, hvønn veg tað bar. B68 var í umstillingsspælinum ár í venjing frammanfyri KÍ, og sjálvsálitið hjá toftamonnum var eyðsýniligt.

Beint fyri hálvleik royndi Øssur Hansen seg aftur við frísparki, og hesaferð var tað Niklas Joensen, sum slapp at beina bóltin í málið.

### Øssur allastaðni

Gjøgnum seinna hálvleik heilt B68 fram at vera omaná. KÍ spælið hekk ikki væl saman, og serstakliga nógvir bóltar vórðu mistir á miðjum vølli. Hetta dámdi B68 heilt væl, so hvørt teir herjaðu á í mótálopum.

Tað var í einum av hesum, at Øssur Hansen á triðja sinni slapp at leggja upp til mál. Við eini sending uppá einar 40 metrar fekk Óli Olsen, sum ikki hevur skorað, síðan hann kom í land, bóltin við handaru stong. Um enn eitt sindur ótrygt fekk hann lagt bóltin í málið, og nú var B68 trygt á odda.

Men 10 sekund áðrenn hetta, skuldi KÍ havt javnað, tá ikki færri enn tveir leikarar stóðu við nærum opnum málið.

### Páll slapp eisini

Tað var onkursvegna lagt upp til, at Páll Klettskarð skuldi fáa sín fyrsta dyst í ár fyri besta liðið hjá KÍ við at loysa Toda Jónsson av. Men í støðuni KÍ var í, valdu teir at satsa, og tóku Oddmar á Lakjuni á høgra bakki av vøllinum og settu áloyparan á vøllin í staðin.

Gjøgnum dystin fekk hann eisini onkran møguleika. Men tað var ikki fyrr enn Niklas Joensen hevði skorað sítt seinna mál, og dysturin endaliga var avgjørdur, at Páll Klettskarð skoraði sítt fyrsta mál fyri KÍ.

Tá B68 gav bóltin upp eftir málið hjá Páli Klettskarð, floytaði Dagfinn Olsen dystin av. Tá vóru nógvir av KÍ áskoðarunum longu burtur. Bláu leikararnir løgdu seg niður og vónloysi lýsti av teimum. Hinvegin var fagnaðurin hjá B68 nærum óstýriligur og leikaranir fóru í einum slagi av gleðisrúsi at takka áskoðarunum.

Kanska hetta staðfestir, hvussu nógv at siga, dysturin hevði at siga fyri bæði liðini.

## Samanspælið var munurin

Øssur Hansen, sum legði upp til trý mál í dag, legði størstan dentin á samanspælið.

- Munurin á liðunum í dag, er at vit eru nógv betri samanspæld**ir**. Teir hava fingið tríggjar nýggjar mans, og tað tekur sína tíð at spæla eitt lið saman, greiðir Øssur Hansen frá.

Hinvegin er hann sum teir flestu, tá tosað verður um meistaraheiti.

- Vit hava tað øgiliga stuttligt, tá vit spæla fyri tíðina. Men vit taka bara ein dyst á gangin. Royna at njóta tað, og so verður tað, sum tað verður.

## Todi fegin at vera aftur

37 ára gamli áloyparin, Todi Jónsson, var fegin at spæla aftur við KÍ, men hann staðfestir, at avrikið hjá KÍ ikki var nóg gott, tá spælt verður ímóti einum so væl spælandi B68 liðið.

- Vit eru ikki sterkir nokk í nærdystunum. Teir sleppa at spæla frítt, og tað gekk heldur ikki nóg skjót fram eftir vøllinum, greiðir Todi Jónsson frá.

Hann leggur afturat, at uppdekkingin ikki var nóg góð, og tí bar so væl til hjá B68 at gagnnýta deyðbóltarnar.

Spurdur um tað er líkasæla, metir áloyparin, at tað heldur eru vantandi royndir, sum eru trupulleikin. Hann staðfestir eisini, at hann er nøgdur við at fáa mál, men at tað altíð er eitt lið, sum bæði vinnur og tapir.